# Nýggj spurnarkapping roynd í SvF

**SvF er farið undir eina nýggja spurnarkapping, sum verður send komandi vetrarhálvu. Tað hevur kostað 15 milliónir krónur at menna júst hetta konseptið við spurningum, har tað ræður um at satsa**

SPURNARKAPPING
*Stefan í Skorini*



*Páll Danielsen er vertur í sendingini, og hann hevur havt 78 luttakarar inni í upptøkuhølunum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Tann 31. august er dagurin, tá nýggja spurnarkappingin í SvF fer av bakkastokki. Allar 30 sendingarnar eru longu upptiknar, tær verða sendar hvørt leygarkvøld fram til 31. mars í 2003, tá finalan er á skránni.

Tað er felagið Blu Entertainment í Danmark við føroyinginum Per Zachariasen, sum hevur ment hetta konseptið, og ætlanin er at selja hugskotið kring allan heim. Føroyar er tað fyrsta landið, har hetta slagið av spurnarkapping verður roynt.

## Satsa

Kappingin hevur fingið navnið Satsa. Og tað ræður um at seta stigini uppá spæl og satsa. Vinnarin gerst 50.000 krónur ríkari, og tí er umráðandi at hava tunguna mitt í munninum.

Kappingin er skipað soleiðis, at tríggir luttakarar kappast í senn. Í fyrsta umfari fáa teir tveir spurningar hvør. Um luttakarin svarar rætt, fær hann 2000 stig. Svarar hann hinvegin skeivt, fáa hinir báðir hvør síni túsund. Tú verður tískil revsaður fyri at svara skeivt.

Í øðrum umfari verður spælið meira taktiskt, tí luttakararnir kunnu tá lata spurningin fara víðari til ein av hinum, sum síðani skal svara. Um spurningurin verður sendur víðari, fær hann samstundis størri virði. Tann luttakarin, sum sendir spurningin víðari skal lata ein part av sínum stigum í eina pulju. Svarar viðkomandi tá rætt, fær hann øll stigini, men svarar hann skeivt, so fær tann, sum sendi spurningin víðari, øll stigini.

Á henda hátt kunnu luttakararnir stjala stig frá hvørjum øðrum við at senda spurningar víðari. Við at satsa kunnu luttakararnir vinna sær enn fleiri stig, og tí vinnur bara við at satsa og at leggja røttu ætlanina.

## Eingin kameramaður

Hetta er tann størsta undirhaldssendingin hjá Sjónvarpi Føroya higartil, sum framleidd er í studio. Og tað er ein sera vakur og framkomin leikpallur, har hetta spælið fer fram.

Teir tríggir luttakararnir og verturin, ið er Páll Danielsen, eru umgyrdir av teldustýrdum myndatólum, ið mala kring pallin. Í einum rúmi nærhendis situr ein maður og stýrir. Eingin kameramaður er á pallinum, og at framleiða eina slíka sending krevjast bara fýra fólk umframt vertin.

Tá kappingin verður send hoyrast lógvabrestir frá áskoðarum, sum eisini síggjast á skerminum, men í veruleikanum er eingin áskoðari til sendingarnar. Myndir av áskoðarum eru festar á veggin aftanfyri, og klappini eru tikin upp frammanundan.

Allir luttakararnir hava skrivað undir uppá, at teir ikki skulu avdúka, hvat úrslitið av teirra sending verður. Tilsamans 78 luttakarar hava verið við til upptøkurnar

## Skal seljast

Per Zachariasen hevur verið við at framleiða júst hetta hugskotið, og hann er sera væl nøgdur, nú hann hevur sæð fyrstu sendingarnar á skerminum.

– Konseptið er sera einfalt, men tað tekur langa tíð at framleiða. Vit hava nýtt umleið eitt ár at gera karmarnar um sendingina, sigur Per, sum er er ovfarin av, hvussu væl tað hevur gingið í hond við upptøkunum í Føroyum.

Hann sigur, at Blu Entertainment hevur funnið uppá nakað heilt nýtt innan spurnarkappingar við hesi sendingini, og tí er spennandi hvussu hon verður móttikin. Fyrimunurin er, at hon er ómetaliga bílig at framleiða, og møguleiki er fyri hópframleiðslu.

Ætlanin er, at hetta konseptið skal seljast uttanlands. Á filmsfestivalinum í Cannes herfyri vóru fólk frá søludeildini hjá Blu Entertainment, sum er eitt dótturfelag hjá Freemental Media, og royndu at vísa sendingina fram fyri áhugaðum.

Sum skilst eru samráðingar í løtuni við stóru týsku rásina ZDF. Um ein avtala fæst í lag, er ætlanin tryggjað ímóti undirskoti, men Per hevur góðar vónir um, at sendingin kann seljast í enn fleiri londum.

SvF skal ikki rinda fullan prís fyri sendingarnar. Føroyska sjónvarpið skal bara rinda útreiðslurnar av flutningi, upptøkuhølum og starvsfólki.



*Per Zachariasen og Bjarni Rubeksen sita í kontrolrúminum og stýra myndatólum og sendingini sum heild. Alt studio verður flutt avaftur landinum fríggjadagin*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Shetland Cruise 2002 summarið www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag

Gisting á hotelli
úr einans ... 1.149,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Gisting á vallaraheimi
úr einans ... 746,- fyri hvønn (í lágárstíð)

Privat gisting
úr einans ... 878,- fyri hvønn (í lágárstíð)
Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30
Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrønu
Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.

Ring og hoyr nærri !
e-mail: booking@smyril-line.fo
team85





*Væntandi, so verður bert tann eini grundlógaravhoyrdur, meðan hinir báðir verða leystlatnir, sigur Bergleif Brimvík*

# Fann av tilvild gott kilo av hassji

**Politiið í Havn handtók seinnapartin týsdagin tríggjar mans fyri at hava eitt gott kilo av hassji í bilinum. Talan er um ein íslendskan auto-kampara, sum kom úr Danmark til Føroya við Norrønu mánamorgunin. Tveir av monnunum eru íslendarar og ein føroyingur**

RÚSEVNI
*Ingrid Bjarnastein*

Í sambandi við ferðslukanningar, ið vórðu gjørdar seinnapartin týsdagin, steðgaði politiið í Havn einum íslendskum autokampara.

– Nú er tað soleiðis, at vit hava altíð grundarlag fyri at steðga einum bili, sigur Bergleif Brimvík av kriminaldeildini á politistøðini í Havn.

– Tá hesin íslendski autokamparin varð steðgaður var tað ikki tí mistanki var um ólóglig evnir. Teir, sum í bilinum vóru, hava kanska víst ein slíkan atburð, at løgreglan helt, at teir skuldu steðgast. Men tað vísti seg so, at vit funnu eitt gott kilo av hassji.

Tríggir mans vóru í bilinum. Tveir íslendarar, faðir og sonur, ávíkavist 41 og 24 ára gamlir, og ein 27 ára gamal føroyingur. Íslendararnir komu úr Danmark við Norrønu mánadagin, og skuldu eftir ætlan til Íslands í hesi vikuni.

Tveir av monnunum eru avhoyrdir og ein var undir avhoyringum fyrrapartin mikudagin.

– Væntandi, so verður bert tann eldri íslendingurin grundlógaravhoyrdur, meðan hinir báðir verða leyslatnir, sigur Bergleif Brimvík.

Vikuskifti í Danmark
Prísur fyri hvønn
Føroyar-Keypmannahavn aftur og fram 1.815,-
Føroyar-Billund aftur og fram 1.853,-
(Ferðaavgjøld eru íroknað prísin)
Tað eru serligar reglur galdandi fyri hesar prísir. Tvey fólk skulu ferðast saman og ferðaseðlarnir skulu keypast 7 dagar áðrenn fráferð. Ferðaseðlarnir kunnu keypast til 9. juni 2002, og seinasti heimferðardagur er 17. juni 2002. Talið á hesum ferðaseðlum er avmarkað.
Set teg í samband við eina ferðaskrivstovu ella far inn á www.maersk-air.dk
MAERSK AIR
It's got to be perfect



GSM FRÍTÍÐ
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum